# – Ein sigur fyri Føroya land

**17 fyri, 13 ímóti og 1 blonk atkvøða. Tað var úrslitið av atkvøðugreiðsluni, um at fáa “kynsliga orientering” skoytta upp í grein 266 b í revsilógini. Fleiri fegnaðust, onnur ilskaðust, men løgtingsformaðurin var ikki í iva: – Hetta er ein sigur fyri Føroya land, segði hann**

POLITIKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*– Hetta er ein sigur fyri Føroyaland og tolsemi, sigur Edmund*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað vórðu ikki søgd mong orð, tá onnur viðgerð av málinum, um at fáa grein 266b í revsilógina víðkaða soleiðis, at hon eisini nevnir samkynd. At “kynslig orientering” verður løgd skoytt upp í núverandi lóg. Menn og kvinnur lótu knøttin tala.

17 atkvøður vóru fyri. 13 atkvøður ímóti. 1 atkvøddi blankt og ein tinglimur var ikki til staðar.

Av teimum 17, ið atkvøddu fyri uppskotinum vóru tríggjar “nýggjar” atkvøður. Páll á Reynatúgvu, Olav Enomoto og Edmund Joensen hava allir flutt seg, frá tí teir seinast uppskotið var fyri atkvøddu ímóti, til teir í dag atkvøddu fyri uppskotinum.

Sverre Midjord atkvøddi blankt í dag, og Heðin Zachariassen var ikki til staðar.

Tá atkvøðugreiðslan var liðug í tinginum í dag, fekk Sosialurin hálað løgtingsformannin, Edmund Joensen, til síðis og spurt hann um hansara viðmerking.

– Eg kann svara stutt og greitt, at hetta er ein sigur fyri Føroya land og ein sigur fyri tolsemi, segði løgtingsformaðurin og smíltist.

# Finnur er bjartskygdur

**Finnur Helmsdal hevur ikki hug at leypa framav, nú úrslitið av atkvøðugreiðsluni talar fyri, at uppskot hansara kemur í gjøgnum, og at samkynd verða vard av grein 266b í revsilógini. Hann viðgongur tó, at hann er bjartskygdur til triðju viðgerð**

POLITIKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

– Vit mugu minnast til, at hetta bert er onnur viðgerð av uppskotinum, svaraði Finnur Helmsdal, tá eg spurdi hann, hvussu hann sá upp á úrslitið av atkvøðugreiðsluni.

Hann hevur á ongan hátt hug at leypa framav, hóast nógv bendir á, at uppskotið hjá honum og Annitu á Fríðriksmørk fer at verða samtykt.

– Eg fari ikki at kanna mær bitan áðrenn hann er svølgdur. Men eg havi hug at siga, at rættarnevndin hevur verið fari, og báðir partar hava gjørt eitt gott arbeiði, segði Finnur Helmsdal við Sosialin í tinginum í dag.

Finnur Helmsdal hevur serliga hug at nevna Poul Michelsen, sum eisini var ein partur av rættarnevnd Løgtingsins.

– Poul Michelsen haldi eg hevur gjørt eitt sera gott arbeiði í hesum málinum.

Spurdur um, hvussu hann metir útlitini vera, fyri at uppskotið verður samtykt til triðju viðgerð, svarar Finnur Helmsdal, at hann er bjartskygdur. Men hann er tó skjótur at leggja aftrat, at hann als ikki tekur nakað fyri givið.

– Vit hava áður sæð, at uppskot, sum eru samtykt til aðru viðgerð, verða feld til triðju viðgerð, vísir Finnur Helmsdal á.



*Í tingsalinum vóru tað bara Jóannes Eidesgaard og Jógvan á Lakjuni, sum tóku orðið, men eftir atkvøðugreiðsluna kjakaðust mótpolarnir Bill Justinussen og Finnur Helmsdal*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

# Ein ósigur fyri Føroyar

**Tað metir Bill Justinussen úrslitið av atkvøðugreiðsluni í dag er, og hann heldur ikki at útlitini fyri, at uppskotið verður felt til triðju viðgerð, eru góð**

POLITIKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað var ikki torført at lesa av, hvat Bill Justinussen helt um úrslitið av atkvøðugreiðsluni í tinginum í dag.

– Hetta var ein ósigur fyri Føroyar. Hetta brýtur ryggin í øllum teimum virðum og viðurskiftum, ið samfelag okkara hevur bygt á, segði Bill Justinussen, tá vit í tinginum spurdu hann um eina viðmerking.

Bill Justinussen sigur, at nakrir tingmenn eftir hansara tykki hava verið alt ov lættir at ávirka.

– Fleiri tingmenn hava latið seg boygt av aggressivum fólkum frá “JA-síðuni”, og hava ikki torað at staðið ímóti, heldur Bill Justinussen.

Bill Justinussen vísir á, at nakrir tingmenn hava handlað desperat, og ikki hava verið greiðir yvir, hvat tað er teir hava atkvøtt fyri.

– Tað er nakrir, sum hava misskilt hetta og atkvøtt fyri, bara fyri at fáa frið. Men hyggja vit at hinum Norðurlondunum, sum vit dáma so væl at samanbera okkum við, so vísir tað hjá teimum, at hetta uppskotið ikki gevur nakran frið, sigur Bill Justinussen.

## 4300 fólk ímóti

Dánjal Petersen úr Kollafirði hevur seinastu tíðina savnað ikki minni enn 4300 undirskriftir frá fólkum, sum øll eru ímóti at “kynslig orientering” verður skoytt uppí grein 266b í revsilógini.

– Er tað ikki flott av einum manni, spurdi hann skemtandi, tá vit hittu hann uttan fyri løgtingið, beint undan at tingmanningin fór at atkvøða um hetta sama evni. Stutt framman undan hevði hann handað undirskriftirnar inni í tinginum, og vit spurdu Dánjal Petersen hvat hann roknaði við, at úrslitið fór at vera í dag.

– Eg tori ikki at siga tað við vissu, men eg rokni við at uppskotið fellur við einum teprum meiriluta, var hansara meting.

Tað var so ikki støðan í dag, men møguliga fær Dánjal Petersen rætt til triðju viðgerð.

